Blákrossheimið
www.blakross.fo

# Søkt verður eftir sálarfrøðingi

Vilt tú, saman við hinum starvsfólkum okkara, ganga á odda við at eggja til lívsbroytingar?

Sum sálarfrøðingur á Blákrossheiminum kemur tú at hava avgerandi ávirkan á viðgerðina, tú kemur at virka sum bólkaleiðari og hava staksamrøður við búfólk, avvarðandi og ambulentar samrøður. Fyri rætta umsøkjaran kann talan verða um at tú kemur at hava ábyrgd av allari viðgerðini. Supervisión av starvsfólkum verður eitt øki tú kemur at arbeiða við.

Viðgerðin á Blárossheiminum er ein sálarfrøðilig og sosialpædagogisk viðgerð, sum mest byggir á kognitiva broyting, skipað við bólkaarbeiði og staksamrøðum.

Vit arbeiða støðugt við at menna viðgerðartilboð okkara, m.a. við eftirmeting. Hetta kemur tú at hava ein týðandi leiklut í.

**Vit rokna við at tú:**
• ert útbúgvin sálarfrøðingur ella ert við at verða liðugur við tína útbúgving
• ella hevur tikið psykoterapeut/familjuterapeut útbúgving eftir aðra longri ella miðallanga grundútbúgving.
• hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
• ert álitisvekjandi og álítandi
• hevur góð samstarvsevni
• vilt arbeiða samsvarandi blákross hugsjónini

**Løn/setanartreytir:**
Lønin, og aðrar setanartreytir, verður ásett smb. sáttmála millum Fíggjarmáláráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Setan:**
Skjótast tilber.

**Umsókn:**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Um hetta hevur tín áhuga, send okkum so eina umsókn, sum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 4. november. Umsóknin skal sendast til:

**Blákrossheimið**
Att.: Olga Magnussen, leiðari
Lynggøta 12
FO-100 Tórshavn

Meir fæst at vita um starvið, við at venda sær til Olgu Magnussen, leiðara, á tlf. 315575 ella teldupost olga@blakross.fo

*Blákrossheimið, ið er eitt viðgerðarheim fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar, er stovnsett av Bláa Krossi Føroya við góðkenning frá Føroya Landsstýri. Á heiminum eru 9,5 ársverk. Pláss er fyri 15 búfólkum.*

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Gøtu kommuna

## KUNNGERÐ

**Samsvarandi áður lýstu kunngerð frá Løgmálaráðnum dagf. 23. sept. 2008 kommunuval fram**

**týsdagin tann 11. nov. 2008.**

**Valið til Bygdarráði í Eysturkommunu fer fram soleiðis:**
veljarar í Gøtu: í samkomuhøll skúlans við Gøtugjógv og
veljarar í Leirvík: á kommunuskrivstovuni í Leirvík

**Atkvøðutíðin verður :**
Kl. 10.00 - kl. 20.00
ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og verður tá valið lýst liðugt.

**Brævatkvøður:** Sjófólk og onnur, sum ikki rokna seg at vera heima valdagin, og veljarar, sum eru staddir uttanlands, kunnu greiða atkvøðu við brævatkvøðugreiðslu í fyrsta lagi 4 mánaðir áðrenn valdagin.

Í øðrum førum skal brævatkvøðan avgreiðast í fyrsta lagi 1 viku áðrenn valdagin ( t.e. 4. nov. 2008) og í seinasta lagi dagin fyri valdagin við at venda sær til fólkayvirlitið / kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøður skulu verða valstýrunum í Gøtu ella Leirvík í hendi innan valið byrjar kl. 10. 00 tann 11. nov. 2008.

**Heimaval:** Veljarar, ið vegna sjúka ella vantandi førleika, ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri valið við at boða frá til kommunuskrivstovunar í Gøtu tlf. 47 10 00 ella Leirvík tlf. 44 30 06 – innan kl. 15.00 mánadagin tann 10. nov.

**Valkort:** Valkort verða send út við postinum. Um onkur, ið heldur seg hava valrætt í kommununi, ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi vinarligast biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

**Minnist til at hava valkortið við á val.**

**Valstýrini í Gøtu og Leirvík**
*Måns Persson, form. Jákup Meinhard Sólbjørg, form.*

**Valnevndin fyri Eysturkommunu**
*Erik Lervig, form.*

*9. nov. 2008.*

# EYSTUROYAR BETONG

vit átaka okkum alt stoypiarbeiði eitt nú:
Grundir - soklar - trappur - garðar o.a.

Ring og fá eitt óbindandi tilboð

**Eysturoyar Betong**
Tlf. 212090 - 223866

TVØROYRAR KOMMUNA

## Stuðul til barnaansingina í Suðuroy

**Søkt verður eftir stuðli til 5 ára gamalt barn at byrja skjótast gjørligt.**

Arbeiðsøkið er Dagstovnurin Mýrifípan í Trongisvági, fyrrapartar og Spælistovan hjá Dagrøktini í Sumba, seinnapartar. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Arbeiði krevur, at tú skalt koyra barnið til og frá Mýrifípuni og Spælistovuna.

**Vit vænta av tær:**
• At tú hevur eina námsfrøðisliga ella aðra viðkomandi útbúgving
• At tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir
• At tú ert tolin og vísir umsorgan
• At tú dugir at síggja møðuleikar frammum forðingar
• At tú hevur virðing fyri børnunum, foreldrum og starvsfeløgum
• Tú verður ein partur av einum tvørfakligum toymi.

Tín arbeiðsuppgáva fevnir um at stuðla og menna barnið, og fylgja teimum tiltøkum, ið eru/verða sett í verk uttan fyri heimið, t.d. fara til venjingar.

Lønin er sambart sáttmálað við avvarðandi fakfelag og KAF ella Fíggjarmálastýrið.

Umsókn, saman við prógvi og viðmælum, verður at senda til Dagstovnin Mýrifípan, Smærugøta 8, 826 Trongisvágur innan **fríggjadagin 24. okt. kl. 12**

Um ongin við viðkomandi útbúgving søkir starvið, verður hjálparfólk sett í staðin.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Guðruna Petersen, Leiðara í Mýrifípuni, tlf 372700 ella Súsonnu Poulsen, leiðara í Dagrøktini, tlf 281339

KIOSK ACTIV

# Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir fólki til at arbeiða kvøldvaktir og dagvaktir í Kiosk Activ.

**Nærri fæst at vit við at ringja á tlf. 73 37 41**